## Harður eftirskjálvti

Klokkan tvey í nátt var ein harður eftirskjálvti miðskeiðis í Kili. Hann var 6,1 á Richter-stiganum. Síðani tann harða jarðskjálvtan seinasta leygarmorgun hava umleið 200 eftirskjálvtar verið í økinum, og jarðfrøðingar siga, at roknast kann við eftirskjálvtum einar tveir mánaðir afturat. Eftirskjálvtarnir eru so mikið harðir, at teir kunnu elva til flóðaldur, og tað hevur fingið fleiri túsund fólk at flýggja burtur frá strondini, skrivar Reuters. Kilsku myndugleikarnir kunngjørdu í nátt, at talið á deyðum eftir jarðskjálvtan leygarmorgunin er nú komið upp á 802.



## Obama mist tolið

Barack Obama, forseti, leggur nú av álvara trýst á republikanararnar fyri at fáa teir at taka undir við uppskoti hansara um nýskipan á heilsuøkinum. Í gjárkvøldið segði hann, at kann Kongressin ikki taka sær annað skinn um bak og samtykkja heilsunýskipanina, er hann til reiðar at gera tað. Við hesum sipaði hann til tað, sum amerikanararnir kalla "reconcilliation", og sum gevur demokratunum møguleikan at avgreiða uppskotið til lóg, sjálvt um teir ikki hava avgjørdan meiriluta í Kongressini. Bæði demokratiskir og republikanskir forsetar hava brúkt hendan møguleikan fyrr, skrivar AP.

# Skuldsettur fyri innbrotið







*Innbrotið í húsunum hjá Bergtóru Poulsen tóktist so løgið, tí einki av týdningi var tikin, men alt húsið var hurrað til*

*Myndir: Norðlýsið*



**Politiið hevur skuldsett ein mann í 20 árunum fyri løgna innbrotið í húsunum hjá Bergtóru Poulsen á Kósini í Klaksvík. Maðurin sigur seg hvørki minnast eitt ella annað**

INNBROT

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Politiið í Klaksvík heldur seg nú vera komið eitt stig nærri við at uppklára innbrotið, sum varð gjørt í húsini hjá Bergtóru Poulsen á Kósini í Klaksvík sunnunáttina 14. februar.

Mikudagin varð ein maður mitt í 20 árunum handtikin og avhoyrdur í nakrar tímar. Maðurin kundi hvørki játta ella avnokta seg sekan, tí hann segði seg ikki minnast nakað petti frá tí náttini. Hann hevði verið so dýrandi fullur, segði hann við politiið.

Eftir avhoyringina varð maðurin latin leysur, men hann varð skuldsettur fyri at hava framt innbrotið.

Innbrotið tóktist so løgið, ti einki varð tikið úr húsunum annað enn seingjarklæðir og slíkt, og innbrotmaðurin hevði latið undirklæði síni liggja eftir í húsunum.

Av tí at maðurin einki veit frá tí náttini, hevur politiið bara teknisku prógvinini at halda seg til. Um prógvini so peika ímóti ella frá manninum.

Nýggjar blóðroyndir verða nú tiknar av manninum, og tær royndirnar verða so samanbornar við royndirnar, sum tiknar vóru á staðnum beint eftir innbrotið.

Hans Djurhuus, sýslumaður í Klaksvík sigur, at høvdu fjølmiðlarnir ikki víst hesum málinum so stóran áhuga, hevði verið torført at loyst gátuna. Øll umrøðan hevur gjørt sítt til, at politiið hevur fingið fráboðanir frá fleiri fólkum. Tað eiga tey stóra tøkk fyri, sigur Hans Djurhuus.

Politiið fekk eina fráboðan, sum vísti á henda mannin, og fráboðanin saman við ymiskar tekningar kanningar, fekk politiið til at fara eftir manninum.

Nú heldur politiið fram við kanningum sínum.

# Uriah Heep kvøld á Seglloftinum Tvøroyri

**Fjepparar hjá Uriah Heep eiga leygarkvøldið á Seglloftinum á Tvøroyri, tá bólkurin Deiggj skipar fyri hugnakvøldið við tónleiki hjá legendariska bólkinum frá sjeytiárunum**

TÓNLEIKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið stendur í tekninum hjá legendariska Uriah Heep, sum Heep eiga eitt ótal av fjepparum í øllum aldri her á klettum, og sum er eitt av teimum orkestrum, ið megnar, ikki einans at varðveita, men eisini framhaldandi leggja afturat sínum fjepparaskara.

Tónleikur teirra er tíðarleysur, og sæst hetta eisini í øðrum londum kring okkum. Eitt nú verður hvørt ár skipað »Heepvention« tiltøkum, ið eru tiltøk, ið Uriah Heep fjepparar fyriskipa. Í hesum sambandi hevur Deiggj verið á konsertferð bæði í Spania og Finlandi. Deiggj høvdu spældu eisini saman við John Lawton frá Uriah Heep.

- Vit hava ta stóru gleði at kunna bjóða suðringum, føroyingum og Heep-fjepparum sum heild, til eitt ógloymandi kvøld á Seglloftinum. Kvøldið verður fyriskipað sum eitt hugnakvøld við lekrari buffét frá konu hond Annu Kirstins, siga fyrireikararnir.

Limirnir hava í Deiggj seinastu valt at dyrkað tann klassiska rockin hjá Uriah Heep. Ikki tí limirnir í bólkinum hava allir sera ymiskan tónleikasmakk, men felags er gamli rocktónleikurin frá sjeytiárunum.

Manningin í Deiggj er Dennis Lave, sang, Páll Lave, guitar og kór, Pætur Dam, hammond og tangentar, Fróði Vestergaard, guitar og sang, Sverri Heinesen, bassguitar og kór og Rani H. Christiansen á trummum.



*Deiggj í Finnlandi í august í 2009. Teir spældu til »Easy livin'in Salo« í býnum Salo í Finnlandi: Fróði, Páll, Sverri, Dennis, Rani og Pætur*